# HOFF STOFF

# - Stóran týdning fyri ferðavinnuna

**Borgarstjórin á Sandi, Páll á Reynatúgvu, heldur, at tað hevur stóran týdning fyri ferðavinnuna í Sands bygd og í Sandoynni, at kongaliga familjan leggur leiðina framvið, nú vitjað verður í Føroyum.**

Hoff Stuff
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Páll á Reynatúgvu segði, tá ið kongaliga fylgið var farið av oynni aftur, at tað eisini er umráðandi hjá sandingum at fáa høvi at vísa sín blíðskap fyri teimum kongaligu. At ein slík vitjan eisini hevur stóran týdning fyri bygdina og oynna, dylur borgarstjórin ikki fyri.

### Leggja størri dent á ferðavinnuna nú

- Tað er umráðandi, at vit nýta eitt slíkt høvi, har ein rúgva av bæði føroyskum og útlendskum fjølmiðlafólkum vitja, til at vísa Sands bygd og oynna fram. Vit eru farin at leggja størri dent á ferðavinnuna í seinastuni, og hetta er ein gyltur møguleiki at bjóða okkum fram, segði Páll á Reynatúgvu. Kunningarstova er á Sandi, og nýggi kunningarleiðarin, Katrin Petersen, royndi eisini at bjóða fremmandu fjølmiðlafólkunum ymiskt tilfar um oynna.



*Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi, heldur tað hava stóran týdning fyri ferðavinnuna á Sandi, at ein hópur av útlendskum fjølmiðlafólkum vitja í sambandi við kongaligu vitjanina.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Spurdur, hvussu tað gongur á Sandi nú, sigur Páll á Reynatúgvu: - Tað er góður trivnaður á Sandi. Fyri fáum árum síðani høvdu vit 30 børn í dagrøktarskipanini, og nú eru tey 60 í tali, og tað skuldi bent á, at ungar familjur trívast her í bygdini, segði borgarstjórin.

# Stongt vegna vitjan

**Bakaríið:** Hóast flakavirkið ikki steðgaði upp, so valdi bakarin í bygdini kortini at steingja handilin fyrrapartin í gjár.

Á einum skelti í úthurðini boðaði hann frá, at vegna kongaligu vitjanina varð handilin stongdur millum kl. 9 og 11.

Hetta var helst ein røtt avgerð. Hóast nógv fólk var samankomið beint uttanfyri handilin, so høvdu fólk helst annað at hugsa um enn breyð og køkur hesa løtuna í øllum førum.

sb.



*Skeltið sigur alt: Eingin keypir breyðvørur ein slíkan dag. Hví skal ein so hava opið?*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



### Sína vanligu gongd

**Flakavirkið:** Alt kann ikki steðga upp, hóast forkunnug vitjan er í bygdini.

Arbeiðsfólkið á Sandoy Seafood lótu lítið við seg koma, tá fyrst kongsskipið Dannebrog og síðani sjóverjuskipið Brimil komu á víkina.

Um so mangt annað steðgar upp ein slíkan dag, so gekk arbeiðið kortini sína vanligu gongd, tá teir fyrstu fínu gestirnir byrjaðu at koma til bygdina árla á morgni.

Samfelagslig virði verða skapt á einum slíkum virki, og tá ræður um at vísa, hvør dygd er í fólki, til eina og hvørja tíð.

sb.

### Vakur tónleikur

**Kirkjan:** Ein partur av skránni á Sandi var í teirri hugnaligu og gomlu kirkjuni, sum er bygd í 1839.

Her tók sóknarpresturin, Jákup Reinert Hansen ímóti og greiddi teimum kongaligu frá ymiskum í kirkjuni.

Samstundis við hetta spældu Anna Klett á klarinett og Páll Sólstein á horni eitt verk, sum sandingurin Sunnleif Rasmussen hevur gjørt. Hetta vóru fantasi'ir yvir Tívilsdøtur.

- Eg haldi, at tað gekk væl. Í øllum førum var Margretha drotning glað fyri spælið, tí aftaná kom hon yvir til okkara og takkaði fyri spælið, sigur Páll Sólstein.

sb.

### Søgulig atkoma

**Grótteigar:** - Her niðri eigi eg mangar góðar løtur og mong góð minni, segði ein sandingur, sum við móður síni var komin oman á ta gomlu lendingina á Grótteigum at taka ímóti teimum kongaligu.

- Vit plagdu at kalla tað fyri á Hamri, men hitt navnið er eisini rætt, segði hann.

Sum so mong onnur, hevði hann eisini fylgt við veðrinum seinastu dagarnar. Og hann var samdur við hinum manninum í, at hetta var ein góður dagur til eina slíka vitjan.

- Var hon komin í gjár, so høvdu tey neyvan kunnað brúkt hesa flotbrúnna at koma í land í, segði hann.

Varð veðrið ikki til vildar, so hevði bygdarráðið gjørt eina neyðætlan, soleiðis at tey kongaligu kundu koma í land inni í sjálvum havnalagnum.

### Doypt og konfirmerað

**Kirkjan:** Donsku tíðindafólkini eru ikki bert áhugaði í tí, sum fyriferst rundan um tey kongaligu. Tey duga eisini at finna fram til aðrar søgur á leiðini.

Ein myndamaður frá eini sjónvarpsstøð hevði fingið orðið á eina tilkomna konu av Sandi, og greiddi hon frá nógvum av tí, sum hon hevði sæð og upplivað í sínum barnaárum.

Hon gekk runt millum húsini í bygdini, við myndamanninum rennandi aftaná sær. Serliga nógv gjørdi hon burtur úr kirkjuni, har tey kongaligu eisini vitjaðu.

- Í hesi kirkjuni eri eg bæði doypt og konfirmerað. Hetta er ein vøkur kirkja, greiddi hon danska myndamanninum frá.

sb.

### - Hevði abbi tín sæð!

**Fløgg:** Til slíkt høvi eru mong børn sum ganga við fløggum – føroyskum, donskum og eisini onkur við tí australska flagginum.

Ein maður bar eyga við ein drong, sum gekk við einum donskum flaggi.

- Ja, nú skuldi abbi hansara sæð hann!

Einki var tó sagt um nakran politiskan lit. Men eingin ivi er tó um, at allir sandoyingar – óansæð sannføring - vóru sera fegnir um hesa vitjanina í gjár.

sb.